Landsbanki Føroya

FAROE ISLANDS GOVERNMENTAL BANK

# Ársfrágreiðing 2021



## INNIHALD

Fíggjarligt støðufesti í hásæti ................................ 1
Nevnd ................................................................ 1
Starvsfólk ........................................................... 1
Landskassin bjálvaður ............................................ 2
Gjaldføri landskassans....................................... 2
Íløgurnar kastaðu av sær....................................... 3
Skuld landskassans ................................................ 4
Nettoskuld landskassans.................................. 5
Kredittvirðið tað sama – Aa2................................. 5
Hvør brúkar, hvør sparir, hvør lænir? .................. 5
Búskaparráðið ........................................................ 6
Føroya Váðaráð og systemiskir váðar.................. 7
Fíggjarviðurskifti Landsbankans ........................... 8

## Fíggjarligt støðufesti í hásæti

Landsbankin virkar fyri fíggjarligum støðufesti og er fíggjarstovnur hjá landinum. Uppgáva Landsbankans er, umframt at umsita ogn og skuld landsins, at eygleiða og greina fíggjargeiran og búskapin sum heild, og gera vart við fíggjarligar váðar.

Landsbankin hevur fýra høvuðsendamál:

1) Virkar fyri fíggjarligum støðufesti í Føroyum
2) Røkir gjaldførið hjá landinum
3) Røkir skuldina hjá landinum
4) Kunnar politisku skipanina og almenningin

Harafturat er Landsbankin skrivstova hjá Føroya Váðaráði og umsitur Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og Búskapargrunnin. Sí løgtingslóg nr. 116 um Landsbanka Føroya og Føroya Váðaráð frá 24. november 2016 við seinni broytingum.

Í mai 2021 var landsbankalógin broytt. Tá varð ásett at nevndin í landsbankanum telur 5 og ikki 7 limir. Landsstýrismaðurin setur nevndarlimirnar eftir tilmæli frá Fróðskaparsetrinum og hann velur formannin.

### Nevnd

Fimm fólk sita í nevndini:

- Fróði Magnussen, formaður
- Sanna Laksá
- Helena Andreasen
- Jan Otto S. Holm
- Johnny í Grótinum

Lógin um Búskaparráð var eisini broytt í mai 2021. Har er ásett at landsbankanevndin eisini er Búskaparráð. Harumframt er ásett at Landsbankin røkir skrivarauppgávuna og hevur dagligu umsitingina hjá Búskaparráðnum.

Búskaparráðið hevur sum uppgávu

1) At gera tvær konjunkurfrágreiðngar árliga, eina 1. mars og eina 1. september
2) Harumframt kann ráðið gera temafrágreiðingar og ráðgeva landsstýrinum í øðrum málum.

Gamla nevndin, sum sat fram til juni mánað, hevur havt 5 fundir, meðan nýggja nevndin, sum samstundis er búskaparráð, síðani juni hevur havt 18 fundir. Á hvørjum fundi hjá landsbankanevndini verður hugt og fylgt við í landskassans gjaldføri, avkasti og skuld, umframt eftirlit við minstagjaldførinum og íløgukørmunum. Ráðið hevur havt nógvar fundir í sambandi við framleiðslu av konjunkturfrágreiðingini, sum kom út 1. september. Nevndin/ráðið viðger eisini altíð samfelagsgongdina og viðkomandi búskaparlig mál á fundunum.

### Starvsfólk

Starvsøkið hjá landsbankanum kann býtast í tvey høvuðsøki: ein bankapart og ein greiningarpart. Bankaparturin arbeiðir við lántøku, skuld og gjaldføri hjá landskassanum, meðan greiningarparturin framleiðir, savnar saman og greinar hagtøl um føroyska fíggjargeiran, og kunnar um týdningarmestu viðurskiftini, ið síggjast í hagtølunum. Skrivarauppgávan fyri Búskaparráðið, sum kom afturat í 2021, hevur fylt nógv hjá nevndini/ráðnum og í umsitingini hjá bankanum. Her tað er serliga konjunkturgongdin, sum fylgt verður við í, umframt at temafrágreiðingar um relevant búskaparlig evni, verða fyrireikaðar.

Eitt starvsfólk er sett afturat í 2021, nú skrivarauppgávan hjá Búskaparráðnum var lagt til Landsbankan at loysa. Landsbankin hevur nú átta starvsfólk umframt stjóran.

## Landskassin bjálvaður

Lógin um Landsbanka Føroya staðfestir, at landskassin skal hava 15 prosent av BTÚ í minstagjaldføri. Ásetingin kom beint eftir kreppuna í 90 árunum fyri at tryggja, at landskassin í kreppustøðum hevur tøkan pening at rinda lønir, pensjónir og aðrar útreiðslur við. Minstagjaldførið (tiltaksgjaldførið) er nóg stórt at rinda skyldurnar í seks mánaðir við, hóast landskassin ongar inntøkur hevur. Minstagjaldførið í 2021 var 3,3 mia. kr.

### Gjaldføri landskassans

Stórur partur av gjaldføri landskassans er sett í virðisbrøv uttanlands. Landsbankin ger eina íløgustrategi, soleiðis at landskassin fær eitt hóskandi avkast, tó við atliti til váðan og eisini við atliti til, hvussu gjaldførur peningurin er, soleiðis at hann, um neyðugt, skjótt kann gerast tøkur.

Meginparturin verður settur í stats- og realkredittlánsbrøv (2,7 mia. í miðal), í altjóða partabrøv (680 mió. kr. í miðal) og nakað í kredittlánsbrøv (389 mió. kr. í miðal). Íløguheimildin hjá Landsbankanum liggur á heimasíðuni www.landsbankin.fo.[1]

Landsbankin kann sambært lógini um Landsbankan eisini umsita ogn og skuld hjá almennum grunnum. Upphæddin hjá almennum grunnum í Landsbankanum var í miðal 247 mió. kr. í 2021. Ognin hjá hesum grunnum verður umsitin eftir sama leisti sum ogn landskassans og grunnarnir fáa tí sama avkast sum landskassin, tó frádrigið eitt umsitingargjald. Til ber at síggja innlánspolitikkin hjá Landsbankanum á heimasíðu Landsbankans.

Landsbankin veitti við ársenda 2018 íløguróktina út til fimm ymiskar norðurlendskar íløguróktarar. Við árslok 2021 vóru íløguróktararnir tó fýra í tali. Landsbankin umsitur eisini sjálvur eina íløgurøð við stats- og realkredittlánsbrøvum – hetta fyri at fáa neyðuga smidleikan í gjaldførinum til raksturin hjá landinum. Ein lítil partur av gjaldførinum er eisini settur í alternativar íløgur, eitt nú í undirstøðukervi, private equity og mikrolán (í miðal 121 mió. kr. í 2021). Sum nakað nýtt er nakað sett í grøn lánsbrøv.

Av gjaldførinum hjá landskassanum stóðu í miðal 120 mió. kr. í Føroyum – hetta er neyðuga upphæddin til dagliga raksturin. Restin er sett uttanlands.

Mynd 1 vísir gongdina í gjaldførinum hjá landskassanum í 2021. Eisini sæst miðal gjaldførið fyri alt árið og minstagjaldførið (kravið á 15 prosent í gjaldføri av BTÚ). Í mai 2021 var landsbankalógin broytt soleiðis, at tá umræður afturrindan ella endurfígging av landskassaláni, kann víkjast frá kravinum um 15% í minstagjaldføri fram til at næsta landskassalán fellur til gjaldingar. Í slíkum føri skal landsins gjaldføri tó ikki minka niður um 13% av BTÚ í undanfarna ári.

Sum myndin vísur, var ríkiligt av gjaldføri frá ársbyrjan til í juni, tá landskassin rindaði aftur eitt lán á 1,35 mia. kr. Eftir tað fall minstagjaldførið í eina tíð niður um tey 15 prosentini, men tó ikki niðurum tey 13 prosentini. Við

[1] Gamalt er, at øll egg ikki mugu leggjast í somu kurv. Soleiðis er eisini við virðisbrøvum – at best er at seta pengar í fleiri enn eitt slag av virðisbrævi. Ein íløgurøð er tí ofta sett saman við ymiskum sløgum av lánsbrøvum (obligatiónum) og partabrøvum. Samansetingin hevur týdning, tí oftast gongur væl við partabrøvum, tá ið illa gongur við lánsbrøvum, og øvugt. Á fakmálið eitur tað at samvariatiónin er negativ, ið merkir at tá tað eina gongur væl gongur hitt illa. Soleiðis verður váðin meira spjaddur.




*Mynd 1 – Gjaldførið hjá landskassanum 2021*

ársenda var gjaldførið 500 mió. kr. omanfyri minstagjaldførið.

Yvirskotsgjaldførið við ársbyrjan 2021 - um 1,4 mia. kr. - stavar frá lántøku í 2020 fyri at byrgja upp fyri búskaparligum avleiðingum av Covid-19.

## Íløgurnar kastaðu av sær

Talva 1 vísir árliga virðisbrævaavkastið hjá landskassanum síðani 2017. Avkastið var gott í øllum árinum, uttan í 2018. 2018 var fyrsta árið við negativum avkasti, síðani Landsbankin (Gjaldstovan 2013-2017) fór undir hetta virksemið. Her er týdningarmikið at vísa á, at virðisbrævakursir (partabrøv, lánsbrøv, kredittlánsbrøv v.m.) sveiggja hvønn dag. Hækkar kursurin, fær landskassin meira fyri virðisbrævið, um tað verður selt. Minkar kursurin, fær landskassin minni.

Avkastið av íløguróktini sveiggjar meira ella minni frá einum ári til annað, og serliga var hetta sjónligt í 2018 og 2019. Tapið í 2018 varð longu vunnið inn aftur í januar 2019 og í 2019 góvu nærum øll sløg av virðisbrøvum positivt avkast.

Talva 1 vísir avkastið av íløguróktini fyri hvørt ár. Men fyri at meta um, hvørt ein íløgustrategi er góð, er rættari at hyggja at miðalavkastinum yvir nøkur ár. Síðani 2017 hevur miðal avkastið verið 2,67 prosent ella 90,6 mió. kr. um árið.

| | Avkast % | Avkast mió. kr. |
|---|---|---|
| 2017 | 2,81 | 82 |
| 2018 | -1,40 | -36 |
| 2019 | 6,30 | 191 |
| 2020 | 1,91 | 75 |
| 2021 | 3,75 | 141 |
| **Miðal 2017-21** | **2,67** | **90,6** |

*Talva 1 – Avkast av gjaldføri hjá landskassanum síðan 2017*

Eins og í 2020 var fíggjarmarknaðurin nógv ávirkaður av Covid-19 í 2021. Samanumtikið gjørdist árið tó gott, serliga tí partabræva-avkastið var so mikið gott. Avkastið í 2021 er eisini merkt av, at tær 1,6 mia. kr., sum tiknar vóru í láni í juni 2020 fyri at byrgja upp fyri Covid-19, stóðu tøkar at brúka, og tí settar í stutt realkreditlánsbrøv. Men stutt lánsbrøv góvu, eins og innlán í banka, negativ avkast í 2021, og tað hevur tí verið við til at gjørt samlaða avkastið fyri árið tað minni.

Avkastið í 2021 av íløguróktini gjørdist 3,75% ella tilsamans 150,7 mió. kr. Av hesum er partur landskassans 142,3 mió. kr. meðan grunnarnir sum landsbankin umsitur, áttu 8,4 mió. kr.

Í talvu 2 sæst miðal avkastið av ymsu virðisbrøvunum, sum Landsbankin hevur gjørt íløgur í. Størsta avkastið er komið av íløgum í partabrøv, meðan tey minnu váðafúsu virðisbrøvini, sum til dømis realkredittlánsbrøv, hava givið negativt avkast.

Pengar, sum landskassin hevur standandi á bók í Føroyum til raksturin, hevur givið negativt avkast av tí at føroyskir peningastovnar, eins og útlendskir peningastovnar, hava givið negativa rentu fyri innistandandi í 2021. Rentan í danska tjóðbankanum, sum eisini er bankin hjá føroysku peningastovnunum, hevði eina negativa rentu alt árið.

| | Miðal íløga mió. kr. | Avkast mió. kr. | Avkast % | Býtið % |
|---|---|---|---|---|
| Partabrøv | 680 | 170,4 | 25,1 | 16,9 |
| Statslánsbrøv | 43 | 1,4 | 3,2 | 1,1 |
| Realkredittlánsbrøv | 2.636 | -44,9 | -1,7 | 65,6 |
| Kredittlánsbrøv IG | 131 | -2,3 | -1,7 | 3,3 |
| Hárentulánsbrøv | 258 | 1,0 | 0,4 | 6,4 |
| Alternativar íløgur | 121 | 25,8 | 21,3 | 3,0 |
| Onnur fíggjaraktiv | 150 | -0,7 | -0,4 | 3,7 |
| **Íløgur tilsamans** | **4.019** | **150,7** | **3,75** | **100,0** |

*Talva 2 – Avkast av íløguróðini hjá landskassanum og grunnum í 2021, býtt á virðisbrævasløg.*[2]

Trupult er at meta um gongdina hjá avkastinum í 2022. Vaksandi inflatión, væntanir um at sentralbankar fara at tátta í og hækka renturnar, fløskuhálstrupulleikar í flutningskervinum, hækkandi orkuprísir, spenta støðan millum Ukraina og Russland, umframt nógva smittan við omikron-variantinum, gera óvissuna sera stóra. Higartil í ár hava partabrævakursirnir sveiggjað nógv og tað sama hevur avkastið av lánsbrøvum.

## Skuld landskassans

Marknaðarvirðið av lánsbrævaskuld landskassans var við árslok 2021 knapt 4 mia. kr. Skuldin hjá landskassanum er sett saman av fýra lánsbrævarøðum. Ein skal rindast aftur í 2022, ein í 2023 og hinar bæðar skulu rindast aftur í 2025 og 2032. Øll fýra lánsbrævalánini eru standandi – tað vil siga, at bara renta, og ikki avdráttur, verður goldin í lánitíðini. Láni-upphæddin verður goldin aftur í einum, tá ið lánitíðin er av.

Mynd 2 vísir miðalrentuna við ársenda, sum landskassin rindar av lánsbrævaskuldini. Í 2021 rindaði landskassin í miðal 0,35% í rentu av sínum lánum, sum við ársenda vóru 4 mia. kr. Til dømis er vert at nevna, at tað eina lánsbrævalánið á 1,3 mia. kr., sum var tikið í 2020 og skal rindast aftur í juni 2022, hevur 0% í áljóðandi rentu. Hetta togar sjálvandi miðalrentuna av landskassaskuldini niður.

Rentan sum Føroyar rinda í sambandi við lántøku er nógv minkað seinastu 10 árini. Í 2011 var rentan á lánsbrævaskuldini í miðal 3,04%. Um rentan var á sama støði sum í 2011, høvdu rentuútreiðslurnar hjá landskassanum verið í miðal 108 mió. kr. hægri fyri núverandi skuld á 4 mia. kr.

[2] Pengar, sum landskassin hevur standandi á bók í Føroyum, verða brúktir til dagliga raksturin hjá landinum. Hesir eru ikki við í talvu 2.




*Mynd 2 – Lánsbrævaskuld: Miðal renta við ársenda*

Vanliga endurfíggjar/tekur landskassin lán á hvørjum ári, men so var ikki í 2021. Eitt lán á 1,35 mia. kr. fall til gjaldingar í juni 2021, men av tí at lánið, sum landskassin tók í juni 2020 á 1,6 mia. kr. sum tilbúgving í sambandi við Covid-19, stórt sæð ikki var brúkt, var hesin tøki peningur brúktur til at rinda lánið aftur við, og tí var ikki neyðugt at fara út á fíggjarmarknaðin at læna. Harvið minkaði lánsbrævaskuldin hjá landskassanum við 1,35 mia. kr.

Næsta lán hjá landskassanum fellur til gjaldingar í juni 2022 og er 1,3 mia. kr. stórt. Sannlíkt er at tað verður møguligt at rinda nakað niður av skuld eisini tá, tí sum tað sæst á mynd 1 omanfyri, so er gjaldførið væl omanfyri minstagjaldførið og tí tøkt til at minka um skuldina við. Sambært fíggjarlógini fyri 2022, verður roknað við einum yvirskotið á 38 mió. kr.

**Nettoskuld landskassans**
Nettoskuldin landskassans við ársenda 2021 var 200 mió. kr. Lánsbrævaskuldin var 4 mia. kr. meðan gjaldførið var 3,8 mia. kr.

## Kredittvirðið tað sama – Aa2

Ratingstovnurin Moody's kredittmetir Føroyar. Seinasta kredittmetingin er frá august 2021. Kredittmetingin var hóast Covid-19 tann sama sum frammanundan, tað vil siga Aa2 við støðugum útlitum. Hetta er triðhægsta rating av 21 møguligum.

Fyri at víðka um íleggjaraskaran er ein rating neyðug, og jú betri kredittmeting, jú betri er rentan, tá ið landið skal taka lán. Kredittmetingin hjá landskassanum kann eisini brúkast sum útgangsstøði, tá ið fyritøkur og stovnar í Føroyum skulu taka lán í útlondum.

Moody's vitjar vanliga Føroyar eina ferð um árið, men í 2021 vóru fundirnir umvegis alnótina. Allar frágreiðingarnar hjá Moody's um Føroyar liggja á heimasíðuni hjá Landsbankanum, www.landsbankin.fo.

## Hvør brúkar, hvør sparir, hvør lænir?

Ein av høvuðsuppgávunum hjá Landsbankanum er at hyggja nágreiniliga at, hvussu nógvir pengar eru ymsastaðni í samfelagnum, eitt nú í bankum, hjá húsarhaldum og hjá fyritøkum. Eisini verður hugt at, hvussu kapitalur ferðast, hvør eigur til góðar, hvør skyldar og javnvág millum skuld og ogn.

Í 2021 gjørdi Landsbankin, umframt ársfrágreiðingina, eina frágreiðing um fíggjarliga støðufestið fyri hvønn ársfjórðing. Í 2022 er eisini ætlanin at koma við eini frágreiðing um fíggjarliga støðufestið fyri hvønn ársfjórðing.

Fyri at taka samanum hevur Landsbankin í 2021 í greiningum og tíðindaskrivum millum annað víst á[3]:

- At Covid-19 hevur verið ein tíðaravmarkaður stoytur heldur enn ein kreppa fyri føroyska búskapin.
- At fíggjarstøða landskassans er góð, men at nettoognin, (skuld frátrekt gjaldføri) átti at

[3] Sí frágreiðingarsavn. Leinkja á forsíðuni á www.landsbankin.fo

verið størri. At fíggjarstøða landskassans, hóast góðar tíðir í nærum eitt áratíggju, í roynd og veru er verri, enn hon var í 2008, tá fíggjarkreppan rakti.

- At mest týðandi uppgávan hjá politikarunum er at umsita tilfeingis-ríkidømið skilagott.
- At útlánsvøksturin hjá føroysku bankunum er øktur í 2021. 3,7% í fyrsta ársfjórðing, við 5,8% í juni 2021 samanborið við juni ári fyri, fyri síðani at vera eitt vet lægri í 3. ársfjórðingi 2021 (5%). Tað eru tænastu- og framleiðsluvinnurnar, sum hava økt um lántøkuna.
- At tapini hjá føroysku peningastovnunum ikki vóru stór í 2020, hóast Covid-19 rakti føroyska búskapin. Tapini øktust í 2020 í mun til árið fyri, men tapini vóru ikki størri í 2020, enn tað tey í miðal hava verið seinastu fimm árini.
- At eginognin hjá fyritøkum er vaksin frá 4 mia. kr. í 2004 til 30 mia. kr. í 2019, meðan skuldin er vaksin úr 9 mia. kr. upp í 29. mia. kr. Sum heild kann sigast at føroyskar fyritøkur eru væl konsolideraðar.
- At summi húski eru meira viðkvom fyri rentuhækkingum. Umleið 2/3 av skuldini hjá føroysku húskjunum er í føroysku peningastovnunum við eini broytiligari rentu, og hesi húskir verða tí beinleiðis rakt, um rentan hækkar. Harafturat hava umleið helvtin av lánunum, sum føroyingar hava í donskum realkredittstovnum, eina broytiliga rentu. Restin av skuldini hjá føroysku húskjunum er realkredittlán til fasta rentu.
- At eftirlønaruppsparingin hjá føroyingum er í minna lagi samanborið við OECD londini.
- At nettoognin hjá føroyingum er á leið somu støðd sum hjá dønum og íslendingum.
- At føroyska ESG-skuldin (ØMU-skuldin) er á sama støði sum hjá hinum Norðan-londunum. EGS-skuldin við ársenda 2021 er um 35% av BTÚ.

## Búskaparráðið

Síðani mai 2021 hevur Landsbankin verið skrivstova hjá Búskaparráðnum. Í september kom fyrsta konjunkturfrágreiðingin[4] hjá Búskaparráðnum, síðani broytingina. Í henni vísur Búskaparráðið millum annað á at:

- Metti vøksturin í BTÚ í 2021 verður 7,9% í leypandi prísum. Føroyski búskapurin er sostatt komin skjótt fyri seg eftir stoytin frá koronufarstóttini. Høvuðsorsøkirnar eru økt privat nýtsla, øktar íløgur og størri tøkunøgd av alifiski.
- Skjóta normaliseringin frá Covid-19 talar fyri størri avlopum á fíggjarlógini. Tað er ikki haldførur fíggjarpolitikkur, at almennu kassarnir í eini búskaparstøðu við nærum ongum arbeiðsloysi og stórum inntøkuvøkstri, ikki hava avlop.
- Tørvur er á ítøkiligum ætlanum, ið virka fyri haldførum fíggjarpolitikki. Ikki minst sæð í ljósinum av demografisku avbjóðingunum, ið Føroyar skal møta komandi árini við skjótt vaksandi talinum av eldri borgarum.
- Trot á arbeiðsmegini er ein fløskuhálsur[5].
- Trot á bústøðum er somuleiðis ein týðandi fløskuhálsur, sum kann forða fyri framhaldandi fólka- og búskaparvøkstri komandi árini. Skilagott er um kommunur við stórum fólkavøkstri framskunda

[4] Sí frágreiðingina á heimasíðu Landsbankans undir Búskaparráðið, Frágreiðingar, heystið 2021.

[5] Síðani Búskaparráðið skrivaði hetta hevur politiska skipanin sett eina sokallað "Fast-track" skipan í verk fyri arbeiðsmegi úr triðja londum. Vinnan hevur tikið væl í móti hesi skipan.

útstykkingar av grundstykkjum, so útboðið av bústøðum betri kann standa mát við eftirspurningin.

## Føroya Váðaráð og systemiskir váðar

Føroya Váðaráð hevur fýra fundir árliga og hevði seinasta fundin í desember 2021. Váðaráðið hevur til uppgávu, eins og Landsbankin – við støðið í greiningum – at eyðmerkja váðar. Meðan Landsbankin hyggur yvirskipað at váðum, hyggur Váðaráðið eftir *systemiskum* váðum.

Føroya Váðaráð er skipað við 5 limum. Limir í Føroya Váðaráðið eru:

- Malan Johansen, landsbankastjóri, forkvinna.
- Jesper Rangvid, professari, CBS.
- Bjørn R. Gudmundsson, skrivstovustjóri, Hagstofa Íslands.
- Jógvan Thomsen, stjóri Vinnustovnurin.
- Jóhannes Pauli Poulsen, fulltrúi, Umhvørvis og vinnumálaráðið.

Váðaráðið sendir út tíðindaskriv eftir hvønn fund, sum greiðir frá umrøddu evnunum. Tíðindaskrivini liggja á forsíðuni á heimasíðuni www.landsbankin.fo.

Váðaráðið vísti í 2021 millum annað á:

- At tað eru ikki greið tekin um at systemiskir váðar undir umbúnað í føroyska bankageiranum, men høgi vøksturin í búskapinum kann, saman við áhaldandi príshækkingum á sethúsamarknaðinum, troti á arbeiðsmegi, og veksandi útlánsvøkstri, elva til at váðar stinga seg upp.
- Heldur vøksturin í útlánunum fram, verður møguliga tørvur á at hækka konjunktursykliska kapitalbuffaran í mun til tað eina prosentið, ið longu er fráboðað.
- Útlánsvøksturin byrjaði at hækka miðskeiðis í 2020 og tað er lántøka hjá privatum fyritøkum og kommunum sum dregur útlánsvøksturin.
- At sethúsaprísirnir framvegis hækka, og vandi kann vera fyri at húsarhald, sum skulu inn á bústaðarmarknaðin, seta seg í stóra skuld. Fá húskir hava tó skuldarlutfall omanfyri 3 (skuld omanfyri 3 til 3,5 ferðir samlaðu árligu inntøkuna er markið, sum peningastovnarnir seta, tá teir veita húsarhaldum sethúsalán).
- At húsarhaldini velja í støðugt størri mun realkredittlán við fastari rentu, samstundis sum tey í minni mun velja realkredittlán við skáa, sum ger fíggjarstøðuna hjá húsarhaldunum meira mótstøðuføra. Harumframt nýta tey, ið hava føroyskt sethúsalán, í sera lítlan mun avdráttarskáa. Føroysku húskini tykjast samanumtikið at vera mótstøðufør.
- At føroysku bankarnir eru væl kapitaliseraðir og hava hvørki havt trupulleika við at bjóða kundum skáa ella at bera tey møguligu tap, ið kundu komið av Covid-19. Tað hevur tískil gagnað búskapinum, at føroyski bankageirin hevur verið so mikið sterkur seinastu tíðina undir Covid-19, og undir stóru búskaparligu framgongdini seinastu árini.
- At fíggjarligu váðarnir í Føroyum eru minkaðir, nú samlaði javnin hjá BankNordik er lækkaður í sambandi við søluna av donsku deildini.
- At Føroya Váðaráð fer í samstarvi við danska fíggjareftirlitið at kanna møguleikarnar fyri at betra um dátugrundarlagið og tær fortreytir, ið liggja handan stresstestirnar, sum fíggjareftirlitið árliga ger av føroysku bankunum

Samanborið við Landsbankan og Búskaparráðið, sum eru ráðgevandi, hevur Váðaráðið nøkur amboð. Váðaráðið kann geva

eina eygbering, eina ávaring og eitt tilmæli[6] umframt at geva danska váðaráðnum úttalilsi, tá tað viðvíkir donskum málsøki.

Í 2021 brúkti Váðaráðið fyri fyrstu ferð amboðið eygbering. Váðaráðið vísur á, at tað kann vera ein váði at tveir myndugleikar hava eftirlit við Betri samtakinum, sum kann ávirka fíggjarliga støðufestið í Føroyum.[7]

Harumframt hevur Váðaráðið í 2021 givið eitt úttalilsi til Det Systemiske Risikoråd í Danmark viðvíkjandi regulering av føroyska bústaðarmarknaðinum. Í løtuni er kunngerðin "Bekendtgørelsen om god skik for finansielle virksomheder" galdandi í Føroyum. Í mun til hesa kunngerð hevur "Bekendtgørelsen om god skik for boligkredit", sum er galdandi í Danmark, útgreinandi ásetingar um eginfígging og skuldarlutfall. Váðaráðið hevur tað fatan, at føroysku bankarnir longu lúka hesar ásetingarnar um eginfígging og skuldarlutfall, og tað er tí fyrst og fremst ein spurningur um at formalisera hesa siðvenju

## Fíggjarviðurskifti Landsbankans

Landsbankin hevði í 2021 nettojáttan á fíggjarlógini. Sambært landsbankalógini er árliga játtanin fram til 1. januar 2022[8] 4 promillu av minstagjaldførinum. Tað svarar til 13,2 mió. kr. í 2021. Harafturat hevur Landsbankin inntøku av at umsita Arbeiðs-marknaðareftirlønargrunnin, og somuleiðis eina minni inntøku av at umsita ogn hjá almennum grunnum. Tilsamans gav hetta eina inntøku á 1,8 mió. kr. í 2021. Samlaðu inntøkurnar í 2021 eru tí 15,0 mió. kr.

Samlaðu útreiðslurnar hjá Landsbankanum vóru 10,1 mió. kr. í 2021, samanborið við 8,6 mió. kr. í 2020. Av teimum 10,1 mió. kr. vóru 6,9 mió. lønir (6,5 mió. kr. í 2020) og keyp av vørum og tænastum v.m. vóru 3,2 mió. kr. (2,2 mió. kr. í 2020) Keyp av vørum og tænastum er í stóran mun útreiðslur til KT, virðisbrævabókhald og aðra sakkøna hjálp, íroknað útreiðslur til Moody's. Í 2021 var eisini ein stór útreiðsla í sambandi við greining av Betri samtakinum gjørd av Deloitte.

Største útreiðslan hjá Landsbankanum er til lønir. Lønarútreiðslurnar vóru 0,4 tkr. hægri í 2021 samanborið við 2020. Ein av høvuðsorsøkunum til tað er, at landsbankin hevur sett eitt nýtt starvsfólk í sambandi við at skrivarauppgávan hjá Búskaparráðnum var løgd til bankan at umsita. Eisini hevur ein næmingur á setrinum verið í Landsbankanum í tríggjar mánaðir og skrivað uppgávu.

[6] Sí meira um hetta á heimasíðu Landsbankans undir amboðum hjá Føroya Váðaráði.

[7] Sí https://www.landsbankin.fo/fo-fo/eygbering

[8] Frá 1. Januar 2022 hevur landsbankin vanliga játtan á fíggjarlógini